Spennandi dagur fyri starvsfólk á kantinum:

# **Kantinan** í morgin – hvar gongur leiðin?

Kom við til ein spennandi dag um tíðarinnar rák í kantinuni. Hygg, lurta, smakka!

Hetta vilt tú ikki missa! Dagurin verður fullur av íblástri, har tú fært høvi at hitta allar tínar starvsfelagar úr kantinum í øllum Føroyum.

Vit varpa ljós á nýggjastu rákini í kantinuni: Hvat er ”nudging”? Og hvat kann tað brúkast til? Hvussu fært tú sunnari og bíligari mat við meira smakki í tínari kantinu?

Vinnarin av donsku Kantinuvirðislønini 2012, Mikkel Karstad, verður í køkinum, har tú kanst fáa íblástur og ikki minst eisini hug til at gera heilsubetri mat. Millum annað fara vit at gera vælsmakkandi rættir við góðum fiski, og vit bjóða eisini okkurt til matna.

Heim við tær fært tú vitan, amboð til og ráð um, hvussu tú kanst matgera heilsubetri mat í tíni kantinu, so tað munar, og hvussu tú kanst gera heilsugóðar broytingar í tíni kantinu beinanvegin.

50 tey fyrstu, sum melda seg til, sleppa við, so tað ræður um at skunda sær! Tak tín starvsfelaga við og sig tað víðari við tey, tú kennir, ið starvast á eini kantinu.

Vit gleða okkum at síggja teg!

**Nær**? Mikudagin 24. september 2014, kl. 9.00-15.30.
**Hvar**? Í veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum og verkstovur í køkinum.
**Hvussu**? Melda til á poulap@folkaheilsa.fo í seinasta lagi tann 10. september 2014. Í tilmeldingini skal standa navn á luttakara/luttakarum og hvørji kantinu, tit koma frá.
**Spurningar?** Hevur tú spurningar um tiltakið, vend tær til Poulu Patursson, átaksleiðara í kosti, Fólkaheilsuráðið, poulap@folkaheilsa.fo, tlf 515156.
**Kostnaður**? Ókeypis.